# NÁMSÆTLAN

Orgul

Tórshavnar musikkskúli

## ALMENN LÝSING AV LJÓÐFØRINUM

Orglið er størsta ljóðføri, sum til er. Bæði í vavi, ljóðstyrki, klangi og ymiskleika. Orgul er eitt blásiinstrument við tangentum, sum líkjast klavertangentum. Tangentrekkjan er tó stytri og ofta eru fleiri tangentrekkjur. Ofta hava orgul eisini eina tangentrekkju, sum man spælir á við fótunum. Flestu orglini standa í kirkjum og floyturnar í orglinum, sum geva ljóð frá sær, kallast pípur. Fyri ikki at blanda við onnur sløg av orglum sum elektrisk ella elektronisk orgul, kallast orglið tí ofta pípuurga ella kirkjuorgul. Børn í 10 ára aldri kunnu byrja at læra at spæla orgul. Tú skalt eiga eitt klaver, keyboard ella el-orgul, so tú kanst venja heima við hús. Byrja verður við at læra at spæla eftir nótum. Fyrst sangir og smá tónleikaverk, seinni sálmar og størri verk. Um onkur hevur spælt klaver í nøkur ár, kann tað vera rættuliga lætt og hugaligt eisini at byrja at spæla orgul. Tangentarnir og nótarnir er teir somu sum á klaver. Bert mátin at trýsta á tangentarnar er eitt sindur annarleiðis. Gongur tað væl, kanst tú skjótt byrja at spæla onkran sálm til guðtænastur í smærri kirkjum. Tørvur er á orgulleikarum kring landið, so brúk er fyri tær, um tú dugir at spæla orgul.

# INNSKÚLING – MENNINGARSTIG 1

## FRÁLÆRUMÁL

### ALMENN FRÁLÆRUMÁL

- næmingurin hevur grundleggjandi framførsluførleika.
- luttekur í samanspæli/sangi, og er felagsliga fúsur og virkin.
- lærir við at spæla, kanna, troyta nýggjar leiðir, og hugleiða um tað, ið farið er fram.
- kennir grundhugtøk innan tónleik.
- venur seg við at framføra á hóskandi palli.
- er partur av tí livandi mentanarlívinum í nærumhvørvinum, og er harvið við til at skapa lívsgleði og felgssamleika.

### FRÁLÆRUMÁL TIL LJÓÐFØRIÐ

Næmingurin lærir:

- Nótar á byrjanarstigi
- Um nótasystemið, lyklar, nótanøvn, fortekn og nótavirðir.
- Um puls og takt, klappa og telja
- Um akkordir
- Spæla eftir nótum einræddað og einkul fleriræddа
- Progressiónin fylgir gongdini í klaverskúla, supplera við øðrum tilfari á hóskandi stigi

### UPPGÁVAN HJÁ LÆRARANUM ER

- menna eitt frálæruumhvørvi, har samstarv, uppliving og virksemi verða sett í hásæti.
- leggja dent á arbeiðshátt og dugnaskap.
- leggja lunnar undir grundførleika og tónlistaligar grundtættir.
- vekjur ans og mennir hjáveru.
- er opin fyri breiðum og fjøltáttaðum samstarvi
- er partur av tí livandi mentanarlívinum í nærumhvørvinum, og er harvið við til at skapa lívsgleði og felgssamleika.

# INNSKÚLING - MENNINGARSTIG 1

## Verklisti

*VALDIMARSSON, B. T.: Piano-leikur 1. hefti, Nótnaútgáfa BÞV*
*WEDGEWOOD, PAM: Up-grade Pop! Piano Grades 0-1, Faber Music Ltd*
*MORTENSEN, JENS MORTAN: Sálmaløg Føroya kirkju i lættari útgavu, Føroyskt Kirkjumál 2003*
*ABRSM: Piano Specimen Sight-Reading Tests, Grade 1, ABRSM*

*Tekniskar venjingar á hóskandi stigi*
*Skalaspæl eftir minninum*
*Føroysk sang- og sálmaløg, skipaði á hóskandi stigi*

## Venjingar

## Tónastigar, trý- og fýraljómar, minkaðar og víðkaðar ljómar, improvisatión o.a.

*C-dur, G-dur ein/tveir oktavir hvørjari hond sær/báðar hendur*

# BYRJANARDEILD - MENNINGARSTIG 2

## FRÁLÆRUMÁL

### ALMENN FRÁLÆRUMÁL

- næmingurin dugr at handfara ljóðføri og brúka partar av tí.
- næmingurin hermir, spælir/syngur løg og rytmur eftir oyranum.
- lurtar eftir, og metur um egnu framførslu.
- merkir taktina/pulsin í verkinum.
- lesur nótar við at syngja á nótanøvnum.
- lesur nótar við at samanbera og finna nótar, ið líkjast.
- spælir einføld løg av nótablaði.
- ger, fyriskipar og skrivar niður síni egnu løg.
- finnur upp á løg út frá tónum, søgum, og huglagi.
- greiðir frá tí, ið eyðkennir góðan spælihátt og góða grundleggjandi tøkni.
- venur regluliga og samstarvar við læraran og foreldur/avvarðandi í hesum høpi.
- spælir/syngur tónleik í ymiskum høpi.

### FRÁLÆRUMÁL TIL LJÓÐFØRIÐ

Næmingurin lærir:

- Framhald av nótalæra.
- Spælir tví- og tríraddaðir satsir.
- Satsir við akkordum.
- Tónastigar samsvarandi við krøvunum ABRSM stig 1 og 2.
- Progressiónin fylgir gongdini í klaverskúla, supplera við øðrum tilfari á hóskandi stigi.
- Primavista spæl.
- Miðja verður eftir at næmingurin tekur stig 1 og 2 í klaver og orgul.

### UPPGÁVAN HJÁ LÆRARANUM ER

- fær næmingin at venja seg við ljóðførið og tað, ið ljóðførið megnar.
- leggja dent á arbeiðshátt og dugnaskap.
- leggja lunnar undir grundførleika og tónlistaligar grundtættir.
- vekjur ans og mennir hjáveru.
- er opin fyri breiðum og fjøltáttaðum samstarvi
- er partur av tí livandi mentanarlívinum í nærumhvørvinum, og er harvið við til at skapa lívsgleði og felgssamleika.

# BYRJANARDEILD - MENNINGARSTIG 2

## VERKLISTI

*VALDIMARSSON, B. T.: Piano-leikur 2. hefti, Nótnaútgáfa BÞV*
*WEDGEWOOD, PAM: Up-grade Pop! Piano Grades 2, Faber Music Ltd*
*MORTENSEN, JENS MORTAN: Sálmaløg Føroya kirkju i lættari útgavu, Føroyskt Kirkjumál*
*SØRENSEN Z./OLSEN K.: Sálmaløg Føroya kirkju : Lagasavn til Sálmabók Føroya kirkju, Føroyskt Kirkjumál*
*DAVIS, ROGER E.: ABRSM: Syllabus: Organ grade 1 - 2, ABRSM*
*DAVIS, ROGER E.: ABRSM: Piano Exam Pieces, ABRSM Grade 1 - 2, ABRSM*
*DAVIS, ROGER E.: ABRSM: Piano Specimen Sight-Reading Tests, Grades 1 - 2, ABRSM*
*DAVIS, ROGER E.: ABRSM: Organ Specimen Sight-Reading Tests, Grades 1 - 2, ABRSM*
*DAVIS, ROGER E.: The Organist's Manual: Technical Studies and Selected Compositions for the Organ, Norton, W. W. & Company, Inc*

*Tekniskar venjingar á hóskandi stigi*
*Skalaspæl eftir minninum*

## VENJINGAR

## TÓNASTIGAR, TRÝ- OG FÝRALJÓMAR, MINKAÐAR OG VÍÐKAÐAR LJÓMAR, IMPROVISATIÓN O.A.

# MIÐDEILD - MENNINGARSTIG 3

## FRÁLÆRUMÁL

### ALMENN FRÁLÆRUMÁL

- næmingurin hevur grundleggjandi førleikar á ljóðføri sínum.
- næmingurin endurgevur ymisk sløg av tónleiki.
- skapar sjálvur út frá ymiskum tónastigum og tónasamljóðum
- lurtar eftir egnum spæli og spælinum hjá øðrum.
- skilir og dugur at brúka tríklangir og tónastigar.
- spælir einføld stykki eftir oyranum.
- lesur, tulkar og nýtur tónleikaástøði og tónleikasøgu í venjing av verkum.
- skrivar og/ella spælir/syngur egin løg.
- spælir eftir oyranum út frá einum tónastiga.

### FRÁLÆRUMÁL TIL LJÓÐFØRIÐ

Næmingurin lærir:

- Fýraraddaðar sálmasatsatsar sum í koralbókum
- At spæla sálmar og tónleikaverk við pedal
- At spæla til guðstænastur: Forspøl til sálmar, præ- og postludium, kórsvør
- Skalaspæl v.m. samsvarandi krøvunum ABRSM grad 3 og 4
- Primavistaspæl ABRSM grad 4 og 5

### UPPGÁVAN HJÁ LÆRARANUM ER

- byggir víðari á teir førleikar, sum næmingurin longu hevur ognað sær.
- leggur stóran dent á spæligleði og førleika.
- leggur til rættis soleiðis at næmingurin fær roynt seg í ymiskum samanspæli.
- leggur lunnar undir góðan tekniskan førleika og kropsliga tilvitan.
- mennir tónhoyrn og tónalæru í venjing og framførslu.
- leggur dent á tað, ið næmingurin skapar og spælir eftir oyranum.
- mennir grundleggjandi vitan um tónleik.

# MIÐDEILD - MENNINGARSTIG 3

## VERKLISTI

*MORTENSEN, JENS MORTAN: Sálmaløg Føroya kirkju i lættari útgavu, Føroyskt Kirkjumál*
*SØRENSEN Z./OLSEN K.: Sálmaløg Føroya kirkju : Lagasavn til Sálmabók Føroya kirkju, Føroyskt Kirkjumál*
*WØLDIKE, MOGENS: Orgelkoraler til kirkeåret, Wilhelm Hansen*
*FISCHER, JOHANN CASPAR F.: Ariadna Musica*
*ABRSM: Piano Exam Pieces, ABRSM Grade 3, ABRSM*
- *FRESCOBALDI, A.: Allegro í G moll*
- *FRANCK, B.: Vieux Noel úr L'organiste*
- *GØTTSCHE, GUNTHER MARGIN: Das ist ein köstlich Ding*

*ABRSM: Syllabus: Organ grade 4, ABRSM*
- *BACH, J. S.: O Lamm Gottes unschuldig, BWV 1095, Oxford University Press*
- *YOUNG, GORDON: Cathedral Suite, Hal Leonard*
- *ELGAR, E.: Vesper Voluntary No. 3 (from 11 Vesper Voluntaries, Op. 14), Oxford University Press*

*ABRSM: Organ Specimen Sight-Reading Tests, Grades 3 - 4, ABRSM*

## VENJINGAR

## TÓNASTIGAR, TRÝ- OG FÝRALJÓMAR, MINKAÐAR OG VÍÐKAÐAR LJÓMAR, IMPROVISATIÓN O.A.

*Skalaspæl v.m. samsvarandi krøvunum ABRSM grade 3 - 4*

# HÁDEILD - MENNINGARSTIG 4

## FRÁLÆRUMÁL

### ALMENN FRÁLÆRUMÁL

- næmingurin hevur framkomnar førleikar á egnum ljóðføri.
- er førur fyri at kaga djúpt, og spæla tónleik á sjálvstøðugan og persónligan hátt.
- spælir nógv ymisk verk.
- hevur góða tónahoyrn.
- nýtir ástøði í tónleikaframførsluni.
- dugir væl at nýta tónlistalig frøðiheiti.
- hevur nógvar royndir á palli.
- hevur spælt í bólkum av ymiskum slag.
- megnar at framføra krevjandi venjingar og tónaverk.
- ger sær dælt av ymiskum upphitingar- og hugsavningararháttum.
- er góð fyrimynd fyri aðrar næmingar.
- fyrireikar seg við lít bæði til upptøkuroyndir og víðari útbúgving.
- hevur tamarhald á og kunnleika til grundleggjandi tøkni á sínum egna ljóðføri.
- venur á ymiskan hátt og hevur stirðil, í dagliga arbeiðinum.
- framførir javnan.
- leggur framførslu til rættis, og velur verkini í samstarvi við læraran.

### FRÁLÆRUMÁL TIL LJÓÐFØRIÐ

Næmingurin lærir:

- At spæla sálmar við melodispæl
- Stykkir egnaði til konsertspæl
- Improvisera forspøl til sálmar
- Primavistaspæl ABRSM grad 5 og 6

### UPPGÁVAN HJÁ LÆRARANUM ER

- leggja eina menningarætlan, ið er á høgum fakligum og tónlistaligum støði.
- eggja til sjálvstøðugan arbeiðshátt.
- vera førur fyri at síggja menningarmøguleikar, kveikja og geva íblástur.
- birta upp undir tónlistaligt tilvit.
- fáa næmingin at vera tilvitaðan um at seta sær stutt- og langtíðar mál.
- leggja til rættis fjølbroytt samspæl, og geva næminginum drúgvar royndir á palli.
- meta um bæði tilgongd og tilfar saman við næminginum.
- Leggja dent á gott samstarv millum heim, musikkskúla, lærara og næming

# HÁDEILD - MENNINGARSTIG 4

## VERKLISTI

*MORTENSEN, JENS MORTAN: Sálmaløg Føroya kirkju i lættari útgavu, Føroyskt Kirkjumál*
*SØRENSEN Z./OLSEN K.: Sálmaløg Føroya kirkju : Lagasavn til Sálmabók Føroya kirkju, Føroyskt Kirkjumál*
*ABRSM: Syllabus: Organ grade 4 og 5, ABRSM*
- *BACH, J. S.: Erschienen ist der herrliche Tag, BWV 629*
- *BACH, J. S.: Ich ruf zu dir, Herr Jesu Christ, BWV 639*
- *BACH, J. S.: orgulverk*
- *MENDELSOHN; F.: Orgulverk.*

*ABRSM: Organ Specimen Sight-Reading Tests, Grades 5 - 6, ABRSM*

## VENJINGAR

### TÓNASTIGAR, TRÝ- OG FÝRALJÓMAR, MINKAÐAR OG VÍÐKAÐAR LJÓMAR, IMPROVISATIÓN O.A.

*Skalaspæl v.m. samsvarandi krøvunum ABRSM grad 5 - 6*

# FRAMKOMIN DEILD - MENNINGARSTIG 5

## FRÁLÆRUMÁL

### ALMENN FRÁLÆRUMÁL

- næmingurin hevur framkomnar førleikar á egnum ljóðføri.
- er førur fyri at kaga djúpt, og spæla tónleik á sjálvstøðugan og persónligan hátt.
- spælir nógv ymisk verk.
- hevur góða tónahoyrn.
- nýtir ástøði í tónleikaframførsluni.
- dugir væl at nýta tónlistalig frøðiheiti.
- hevur nógvar royndir á palli.
- hevur spælt í bólkum av ymiskum slag.
- megnar at framføra krevjandi venjingar og tónaverk.
- ger sæl dælt av ymiskum upphitingar- og hugsavningararháttum.
- er góð fyrimynd fyri aðrar næmingar.
- fyrireikar seg við lít bæði til upptøkuroyndir og víðari útbúgving.

### FRÁLÆRUMÁL TIL LJÓÐFØRIÐ

Næmingurin lærir:

- at spæla stykkir egnaði til guðstænastuspæl og konsertspæl, við og uttan pedal
- skalaspæl v.m. samsvarandi krøvunum ABRSM grad 7 og 8
- primavistaspæl ABRSM grad 7 og 8

### UPPGÁVAN HJÁ LÆRARANUM ER

- leggja eina menningarætlan, ið er á høgum fakligum og tónlistaligum støði.
- eggja til sjálvstøðugan arbeiðshátt.
- vera førur fyri at síggja menningarmøguleikar, kveikja og geva íblástur.
- birta upp undir tónlistaligt tilvit.
- fáa næmingin at vera tilvitaðan um at seta sær stutt- og langtíðar mál.
- leggja til rættis fjølbroytt samspæl, og geva næminginum drúgvar royndir á palli.
- meta um bæði tilgongd og tilfar saman við næminginum.
- leggja dent á gott samstarv millum heim, musikkskúla, lærara og næming.

# FRAMKOMIN DEILD - MENNINGARSTIG 5

## VERKLISTI

*ABRSM: Syllabus: Organ grade 7 og 8, ABRSM*
*MENDELSOHN; F.: Orgulverk.*
*BACH, J. S.: Orgulverk..*
*FRANK, C.: Orgulverk.*
*MESSIAEN, O.: Orgulverk*
*ABRSM: Organ Specimen Sight-Reading Tests, Grades 6 - 8, ABRSM*
*MORTENSEN, JENS MORTAN: Sálmaløg Føroya kirkju i lættari útgavu, Føroyskt Kirkjumál*
*SØRENSEN Z./OLSEN K.: Sálmaløg Føroya kirkju : Lagasavn til Sálmabók Føroya kirkju, Føroyskt Kirkjumál*
*WØLDIKE, MOGENS: Orgelkoraler til kirkeåret, Wilhelm Hansen*
*WESTERGAARD, SVEND: Kirketonal koralharmonisering, Norsk Musikforlag*
*JØRGENSEN, CLAUS: Noder, Rytmer og Toner, Wilhelm Hansen*
*Urguvitan og Tónleikavitan*
*Egið tilfar*

## VENJINGAR

**TÓNASTIGAR, TRÝ- OG FÝRALJÓMAR, MINKAÐAR OG VÍÐKAÐAR LJÓMAR, IMPROVISATIÓN O.A.**